# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Olympiska talvkappingin er av á hesum sinni. Føroyar rukku framúr úrsliti, tá tað í teimum báðum seinastu dystunum eydnaðist at vinna 7-1 samanlagt*
*Mynd: www.faroechess.com*

# Endaspurtur bjargaði søguligum úrsliti

**Olympisku telvarar Føroya kunnu bera høvdið høgt. Á øðrum sinni í 38 ár, er ein 50% úrtøka tryggjað. Góð endastøðu, sum er betri enn tann hjá Íslandi**

**TALV**
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Føroyar hava tikið lut í talvolympiadum í 38 ár, og gjørdist hesaferð talan um helst besta úrslitið nakrantíð. Á bert øðrum sinni eydnaðist tað føroyska OL-liðnum at røkka teimum magisku 50 prosentunum í samlaðari úrtøku. Talvveteranar og talvserfrøðingar meta, at liðið, sum varð mannað við Helga Dam Ziska, John Rødgaard, Martini Poulsen, Jóan Hendrikki Andreassen og Heina Olsen, er tað sterkasta OL-liðið, sum føroyingar hava mannað í talvsøguni.

Av teimum 146 londunum, sum tóku lut á talvolympiaduni, endaðu Føroyar á einum 61. plássi, sum er í ovaru helvt. Ikki, at vit og íslendingar unna hvørjum øðrum alt gott, men ítróttarliga varð tað ógvuliga nøktandi, at okkara talvúrmælingar vunnu seg framvið Íslandi, sum endaði, sum nr. 64 á talvolympiaduni.

## Byrjaðu væl

Tað byrjaði væl við sigrum ímóti Sri Lanka og Pakistan uppá 3-1 og 2 ½ - 1 ½ . Men í triðja dystinum møttu okkara liðnum, sum vann talvolympiadina, tá saman um kom. Gamli meistarin, Petrosian varð frá Armenia, og hevur hann nógvar landsmenn, sum gera honum listina eftir. Okkara fingu ein sekk uppá 4-0, men uttan at blunka, kann ein siga, at teir eisini fingu eina uppliving fyri lívið. Í fjórða dystinum markeraði Helgi Dam Ziska seg við besta einstaklingaavrikinum hjá Føroyum á hesari talvolympiaduni. Hollendski stórmeistarin, Loek van Wely mátti – ella “King Loek” – sum hann verður nevndur í heimlandinum mátti boyggja seg í dustið yvirfyri føroyska úrmælinginum. Holland vann tó 2 ½ - 1 ½, men samanlagt eitt ógvuliga brúkiligt úrslit fyri okkara menn

## Upp og niður

Næstu 4 dystirnar gekk upp og niður. Ein tepur sigur á 2 ½ - 1 ½ ímóti Bolivia varð togaður heim, men í næsta dystinum kom kanska avrikið, sum okkara menn vóru minst nøgdir við. Costa Rica vann 3-1, men í 7. umfari kom ein 2 ½ - 1 ½ sigur ímóti Suður-Afrika í hús, og menn fingu aftur eina stóra uppgávu. Søguliga hevur Kolumbia verið Føroyum ein herskin biti, og soleiðis skuldi gerast aftur hesaferð. John Rødgaard fekk tó bjargað liðnum einum hálvum stigi, so endaliga úrslitið gjørdist ½ - 3 ½.

## Forloysandi endaspurturin

Arabiska landið, Qatar bíðaði í 9. umfari, og aftur máttu føroyingarnir lúta, hesaferð tepurt 1 ½ - 2 ½ . Tey 50%, sum okkara telvarar tráaðu eftir at røkka, vóru nú langt úti í havsbrúnni, men ein mánað áðrenn jólaaftan brast fyri nev. Libanon fekk ein lúsing uppá 3 ½ - ½, og nú var fifty-fifty úrtøkan aftur at hóma. Friðarligu Føroyar gjørdu aftur um seg í Mið-Eystri, og fekk Sýrialand sama sekk, sum grannalandið, Libanon. Enn ein knúsandi sigur til okkara menn uppá 3 ½ - ½, og magiska talið varð – akkurát – rokkið. Føroyar høvdu sína 50% úrtøku, eru sum nr. 61 endaðir í ovaru helvtini, og frammanfyri brøðurnar fyri norðan. Eftir er bara at ynska, at dystirnir ímóti Hollandi, Costa Rica og Qatar høvdu endað 2-2. Hvat hevði tað ikki borið langt? Sosialurin ynskir Helga Dam Ziska, John Rødgaard, Heina Olsen. Jóan Hendrikki Andreasssen og Martini Poulsen hjartaliga tillukku við søguliga avrikinum.

Føroyska úrtøkan

| | | Telvari | Elo | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | 6 | 7 | 8 | 9 | 10 | 11 | Stig | Dystir | RP | Rating |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | IM | Helgi Dam Ziska | 2416,0 | | | 0,0 | 1,0 | 0,5 | 0,0 | 1,0 | 0,0 | 0,0 | 1,0 | 0,5 | 4,0 | 9 | 2452 | 4,0 |
| 2 | FM | Heini Olsen | 2376,0 | 1,0 | 1,0 | 0,0 | 0,0 | 1,0 | 0,0 | 0,0 | | 0,0 | 1,0 | 1,0 | 5,0 | 10 | 2393 | 2,7 |
| 3 | IM | John Rødgaard | 2353,0 | 1,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | | | 0,5 | 0,5 | 1,0 | 1,0 | 4,0 | 9 | 2309 | -12,8 |
| 4 | | Martin Poulsen | 2281,0 | 1,0 | 1,0 | 0,0 | | | 0,5 | 0,5 | 0,0 | | 0,5 | | 3,5 | 7 | 2179 | -1,3 |
| 5 | | Jóan Hendrik Andreasen | 2179,0 | 0,0 | 0,5 | | 0,5 | 1,0 | 0,5 | 1,0 | 0,0 | 1,0 | | 1,0 | 5,5 | 9 | 2372 | 32,5 |

Føroysku talvini

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **1. Runde am 13.11.2008 um 15:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **112** | **Sri Lanka (SRI)** | **Elo** | **-** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **1 : 3** |
| 37.1 | | Russell M K A | 2230 | - | FM | Olsen Heini | 2376 | 0 - 1 |
| 37.2 | | Peiris T G M | 2100 | - | IM | Rodgaard John | 2383 | 0 - 1 |
| 37.3 | | Wijesuriya G Luxman | 2075 | - | | Poulsen Martin | 2281 | 0 - 1 |
| 37.4 | | Rajapakse R M C M | 2132 | - | | Andreasen Joan Hendrik | 2179 | 1 - 0 |
| **2. Runde am 14.11.2008 um 15:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **-** | **130** | **Pakistan (PAK)** | **Elo** | **2½:1½** |
| 17.1 | FM | Olsen Heini | 2376 | - | | Amir Karim | 2265 | 1 - 0 |
| 17.2 | IM | Rodgaard John | 2383 | - | | Waqar Mohamed | 2207 | 0 - 1 |
| 17.3 | | Poulsen Martin | 2281 | - | | Butt Khalil Ur Rehman | 0 | 1 - 0 |
| 17.4 | | Andreasen Joan Hendrik | 2179 | - | | Ahmed Haseeb | 2253 | ½ - ½ |
| **3. Runde am 15.11.2008 um 15:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **9** | **Armenia (ARM)** | **Elo** | **-** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **4 : 0** |
| 5.1 | GM | Akopian Vladimir | 2679 | - | IM | Ziska Helgi Dam | 2416 | 1 - 0 |
| 5.2 | GM | Sargissian Gabriel | 2642 | - | FM | Olsen Heini | 2376 | 1 - 0 |
| 5.3 | GM | Petrosian Tigran L | 2629 | - | IM | Rodgaard John | 2383 | 1 - 0 |
| 5.4 | GM | Minasian Artashes | 2541 | - | | Poulsen Martin | 2281 | 1 - 0 |
| **4. Runde am 16.11.2008 um 15:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **-** | **20** | **Netherlands (NED)** | **Elo** | **1½:2½** |
| 7.1 | IM | Ziska Helgi Dam | 2416 | - | GM | Van Wely Loek | 2618 | 1 - 0 |
| 7.2 | FM | Olsen Heini | 2376 | - | GM | Stellwagen Daniel | 2605 | 0 - 1 |
| 7.3 | IM | Rodgaard John | 2383 | - | GM | L'Ami Erwin | 2610 | 0 - 1 |
| 7.4 | | Andreasen Joan Hendrik | 2179 | - | GM | Werle Jan | 2582 | ½ - ½ |
| **5. Runde am 17.11.2008 um 15:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **85** | **Bolivia (BOL)** | **Elo** | **-** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **1½:2½** |
| 42.1 | GM | Zambrana Oswaldo | 2478 | - | IM | Ziska Helgi Dam | 2416 | ½ - ½ |
| 42.2 | IM | Cueto Jonny | 2320 | - | FM | Olsen Heini | 2376 | 0 - 1 |
| 42.3 | FM | Campero Ronald | 2255 | - | IM | Rodgaard John | 2383 | 1 - 0 |
| 42.4 | | Gemy Jose Daniel | 2200 | - | | Andreasen Joan Hendrik | 2179 | 0 - 1 |
| **6. Runde am 19.11.2008 um 15:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **66** | **Costa Rica (CRC)** | **Elo** | **-** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **3 : 1** |
| 20.1 | GM | Ramirez Alejandro | 2533 | - | IM | Ziska Helgi Dam | 2416 | 1 - 0 |
| 20.2 | IM | Gonzalez Bernal | 2432 | - | FM | Olsen Heini | 2376 | 1 - 0 |
| 20.3 | IM | Valdes Leonardo | 2401 | - | | Poulsen Martin | 2281 | ½ - ½ |
| 20.4 | IM | Hernandez Basante Francisco | 2247 | - | | Andreasen Joan Hendrik | 2179 | ½ - ½ |
| **7. Runde am 20.11.2008 um 15:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **-** | **84** | **South Africa (RSA)** | **Elo** | **2½:1½** |
| 40.1 | IM | Ziska Helgi Dam | 2416 | - | IM | Kobese Watu | 2369 | 1 - 0 |
| 40.2 | FM | Olsen Heini | 2376 | - | IM | Solomon Kenny | 2337 | 0 - 1 |
| 40.3 | | Poulsen Martin | 2281 | - | CM | Cawdery Daniel | 2265 | ½ - ½ |
| 40.4 | | Andreasen Joan Hendrik | 2179 | - | IM | Mabusela Johanne Mayedi | 2273 | 1 - 0 |
| Føroysku talvini | | | | | | | | |
| **8. Runde am 21.11.2008 um 15:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **-** | **59** | **Colombia (COL)** | **Elo** | **½ :3½** |
| 22.1 | IM | Ziska Helgi Dam | 2416 | - | IM | Cuartas Jaime Alexander | 2489 | 0 - 1 |
| 22.2 | IM | Rodgaard John | 2383 | - | IM | Escobar Forero Alder | 2482 | ½ - ½ |
| 22.3 | | Poulsen Martin | 2281 | - | IM | Barrientos Sergio | 2450 | 0 - 1 |
| 22.4 | | Andreasen Joan Hendrik | 2179 | - | IM | Clavijo Jorge Mario | 2358 | 0 - 1 |
| **9. Runde am 22.11.2008 um 15:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **67** | **Qatar (QAT)** | **Elo** | **-** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **2½:1½** |
| 36.1 | GM | Al-Modiahki Mohamad | 2559 | - | IM | Ziska Helgi Dam | 2416 | 1 - 0 |
| 36.2 | IM | Al Sayed Mohamad N | 2477 | - | FM | Olsen Heini | 2376 | 1 - 0 |
| 36.3 | IM | Nezad Husein Aziz | 2401 | - | IM | Rodgaard John | 2383 | ½ - ½ |
| 36.4 | | Al-Hitmi Mohamad | 2161 | - | | Andreasen Joan Hendrik | 2179 | 0 - 1 |
| **10. Runde am 23.11.2008 um 15:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **-** | **87** | **Lebanon (LIB)** | **Elo** | **3½: ½** |
| 47.1 | IM | Ziska Helgi Dam | 2416 | - | IM | Eid Fadi | 2390 | 1 - 0 |
| 47.2 | FM | Olsen Heini | 2376 | - | FM | Khairallah Faisal | 2337 | 1 - 0 |
| 47.3 | IM | Rodgaard John | 2383 | - | FM | Somoff Abdo | 2282 | 1 - 0 |
| 47.4 | | Poulsen Martin | 2281 | - | | Sakr Nassim | 2121 | ½ - ½ |
| **11. Runde am 25.11.2008 um 10:00** | | | | | | | | |
| **Br.** | **86** | **Syria (SYR)** | **Elo** | **-** | **72** | **Faroe Islands (FAI)** | **Elo** | **½ :3½** |
| 39.1 | FM | Bakr Jwan | 2338 | - | IM | Ziska Helgi Dam | 2416 | ½ - ½ |
| 39.2 | FM | Hamad Ahmad | 2287 | - | FM | Olsen Heini | 2376 | 0 - 1 |
| 39.3 | | Raes A | 2202 | - | IM | Rodgaard John | 2383 | 0 - 1 |
| 39.4 | IM | Hakki Imad | 2422 | - | | Andreasen Joan Hendrik | 2179 | 0 - 1 |